

Betri Trygging P/F

# Hálvársfrásøgn 2018

Interim Report 1H 2018



# Innihaldsyvirlit

## Table of contents


**5 ára yvirlit /** 4
Five Year Summary

**Leiðslufrágreiðing /** 5
Management Review

**Rakstrarroknskapur /** 7
Income Statement

**Fíggjarstøða /** 8
Statement of financial position

**Eginognsfrágreiðing /** 10
Statement of Changes in Equity

**Notur /** 11
Notes

**Frágreiðing til lyklatølini /** 13
Explanation of Key Figures

**Leiðsluátekning /** 14
Statement by the Management

**Partafelagsupplýsingar /** 15
Company Information

# 5 ára yvirlit / Five year summary

| DKK 1.000 | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur / Profit & Loss** | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 180.862 | 178.989 | 167.084 | 156.532 | 155.155 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -109.119 | -463.364 | -100.747 | -118.530 | -122.310 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi í alt / Total operationel expenses | -36.763 | -35.652 | -37.359 | -31.809 | -32.141 |
| Úrslit av endurtrygging / Reinsurance result | -25.885 | 311.107 | -24.287 | -24.319 | -23.128 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Technical result | 5.579 | -12.082 | 2.351 | -20.228 | -23.799 |
| Íløguavkast eftir trygg. tekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | 3.142 | 12.298 | 15.201 | -3.733 | 14.370 |
| Úrslit / Net profit | 7.971 | 447 | 14.360 | -19.700 | -7.745 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Result from net claims provisions | -2.049 | 3.056 | -9.955 | -16.714 | -15.138 |
| **Fíggjarstøða / Balance Sheet** | | | | | |
| Tryggingartekniskar avseting í alt / Total technical provisions | 579.090 | 885.080 | 418.821 | 344.544 | 314.785 |
| Tryggingaráogn í alt / Total technical assets | 113.482 | 440.801 | 71.271 | 39.228 | 39.656 |
| Eginogn í alt / Total equity | 575.277 | 470.909 | 445.313 | 301.572 | 306.432 |
| Ogn í alt / Total assets | 1.179.743 | 1.385.274 | 890.492 | 667.998 | 650.056 |
| **Lyklatøl / Key ratios** | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 61,1 | 262,0 | 61,0 | 76,6 | 79,7 |
| Bruttokostnaðarprosent / Cost ratio | 20,6 | 20,2 | 22,6 | 20,5 | 20,9 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 14,5 | -175,9 | 14,7 | 15,7 | 15,1 |
| Combined ratio / Combined ratio | 96,1 | 106,3 | 98,3 | 112,8 | 115,7 |
| Operating ratio / Operating ratio | 96,9 | 106,9 | 98,6 | 113,1 | 115,5 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum / Relative effect on provisions | 0,0 | 1,3 | -5,5 | -10,3 | -8,9 |
| Eginognsavkast / Return on equity | 1,4 | 0,1 | 3,3 | -6,3 | -2,5 |
| Solvensdekningur / Solvency | 8,74 | 7,15 | 6,79 | 5,75 | 5,39 |

# Leiðslufrágreiðing

Management Review

## Í stuttum / Highlights

- Úrslitið farna tíðarskeið 8,0 mió. kr. / Net result DKK 8.0 million.
- Úrslitið áðrenn skatt 8,7 mió. kr. / Profit before tax DKK 8.7 million
- Tryggingartekniska úrslitið 5,6 mió. kr. / Technical profit DKK 5.6 million.
- Grundarfæfeingið við hálvárið 572 mió. kr. / Base Capital at 1H 2018 DKK 572 million.
- Solvensdekningur við hálvárið 8,7 / Solvency ratio is 8.7
- Roknaður solvenstørvur 221 mió. kr. / Calculated solvency requirement DKK 221 million.
- Yvirdekningur í mun til roknaðan solvenstørv 351 mió. kr. / Excess relative to calculated solvency DKK 351 million.
- Úrslitið 2018 fyri skatt verður væntandi millum 15-25 mió. kr. / Outlook for 2018 is expected to be DKK 15-25 million profit before tax.

Betri Trygging P/F rekur skaðatryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum, og veitir tryggingarvørur til privata og vinnuliga marknaðin, herundir til føroysku sjóvinnuna.

Felagið hevur djúpar røtur í føroyska samfelagnum og føroyska samleikanum. Søga felagsins gongur aftur til 1940, tá ið Tryggingarsambandið Føroyar S/F varð sett á stovn, og fyri partar av virkseminum uppaftur longri aftur. Føroya Vanlukkutrygging og Føroya Brunatrygging, sum í 1940 gjørdust partar av Tryggingarsambandinum Føroyum S/F, vórðu stovnað í ávikavist 1925 og 1937.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Trygging P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

### Úrslit

Úrslitið eftir skatt fyrra hálvár 2018 bleiv 8,0 mió.kr., samanborið við 0,4 mió.kr. fyrra hálvár 2017. Eginognin 30. juni 2018 var 575 mió.kr., meðan fíggjarstøðan javnvigar við 1.180 mió.kr. ímóti 1.283 mió.kr. tann 31. desember 2017.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist eitt avlop á 5,6 mió.kr. ímóti -12,1 mió.kr. fyrra hálvár 2017.

Tryggingargjøld fyri egna rokning í fyrra hálvári 2018 vóru 155 mió.kr. ímóti 150 mió.kr. fyrra hálvár 2017. Gongdin í tryggingarinntøkum verður mett nøktandi.

Skaðabøturnar fyri egna rokning í fyrra hálvári 2018 vóru 111 mió.kr. ímóti 126 mió.kr. fyrra hálvár 2017.

Tryggingarvirksemið er, eins og undanfarna ár, rakt av einstøkum meðalstórum skaðum, sum ikki eru fevndir av endurtryggingum.

Í mun til undanfarna ár, er tryggingarvirksemið ikki rakt av einstøkum stórum skaðum, ið eru fevndir av endurtrygging, og er úrslitið av endurgjaldsavaseting fyri egna rokning nakað betur enn í sama tíðarskeiði í 2017. Hetta er í stóran mun frágreiðing til lækkingina av samlaðu skaðaendurgjøldum fyri egna rokning í mun til fyrra hálvár 2017.

Rakstrarkostnaðirnir fyrra hálvár 2018 vóru 34,8 mió.kr. ímóti 33,3 mió.kr. fyrra hálvár 2017. Hetta svarar til eitt bruttokostnaðarprosent á 20,6%, ið er á leið sum væntað.

Combined Ratio í fyrra hálvári 2018 er 96%, sum er nakað lægri enn fyrra hálvár 2017. Mett verður, at samlaða úrslitið av tryggingarvirkseminum er nøktandi.

Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu gjørdist 3,1 mió. kr. fyrra hálvár 2018 ímóti 12,3 mió.kr. fyrra hálvár 2017. Íløguúrslitið er á leið sum væntað, og verður mett nøktandi.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok eru ongar týðandi hendingar, sum broyta metingina av hálvársfrásøgnini.

### Útlit og váðar í 2018

Úrslitið, tað ið eftir er av árinum, kann verða ávirkað av

veðrinum og av einstøkum stórum skaðum, og annars av gongdini á tryggingarmarknaðinum.

Gongdin í samfelagnum sæst aftur í hækkaðum tryggingarinntøkum og væntandi heldur hendan gongdin á fram í seinnu helvt av 2018.

Hóast óvissa er um skaðagongdina seinna hálvár, verður mett, at skaðaendurgjøld fyri egna rokning verða sum væntað við ársbyrjan.

Kostnaðarstøði felagins er, sum væntað varð við ársbyrjan, og heldur hetta væntandi fram í seinnu hálvu av 2018.

Íløguúrslitið fyri seinna hálvár verður ávirkað av gongdini á altjóða fíggjarmarknaðinum og í rentustøðinum. Av tí at felagið hevur valt ein varnan íløgupolitikk og m.a. hevur avmarkað íløgur í partabrøv, er íløguúrslitið í mestan mun tengt at gongdini í lánsbrøvum og rentustøðinum. Trupult er at meta um rentustøðið komandi hálvár, men roknað verður ikki við, at evropeiska stýringsrentan verður broytt munandi restina av árinum. Hækkar rentan, hevur hetta neilig árin á fíggjaravlopið.

Samanumtikið verður hildið fast við metingina við ársbyrjan um eitt ársúrslit áðrenn skatt á umleið 15-25 mió. kr.

## Summary


Betri Trygging P/F operates on the Faroese non-life insurances marked and offers insurance products within the Private, Commercial and Maritime segment.

The company is a subsidiary of Betri P/F and therefor a part of Betri P/F consolidated annual report.

Betri Trygging P/F post-tax profit for H1 was 8.0 mDKK compared to 0.4 mDKK for the same period last year. As of the 30th of June 2018 the equity amounted to 575 mDKK and the balance sheet amounted to 1.180 mDKK.

Net insurance premiums were 155 mDKK compared to 150 mDKK the same period last year. The development in net insurance premiums is satisfying.

Net insurance claims for H1 2018 were 111 mDKK compared to 126 mDKK the same period last year. This is a bit lower than expected and is considered satisfying.

Total net operating expenses were 34.8 mDKK compared to 33.3 mDKK in H1 2017. Cost ratio is 20.6 and this is as expected.

The technical result for H1 was 5.6 mDKK compared to -12.1 mDKK the same period last year. Combined ratio for H1 2018 was 96%.

The technical result for H1 2018 is considered satisfying.

Investment yield for H1 2018 was 3.1 mDKK compared to 12.3 mDKK the same period last year – this is as expected.

No significant events have occurred after the 30 of June 2018 that affect the result for H1 2018.

The published outlook for 2018 can be affected by weather conditions, single large claims, and changes in the Faroese insurance market.

The investment activities for the rest of 2018 will be affected by the development in the global financial markets and the fixed income marked. Due to the conservative investment policy of Betri Trygging P/F, the company is to a high degree exposed to the fixed income marked and hence the interest rate levels. Due to considerable global economic uncertainty, it is difficult to predict the interestlevels in the foreseeable future.

Due to the fact that net insurance premiums are expected to increase and net insurance claims for H2 are expected to be about the same as in H1 2018, the result for 2018 is expected to be positiv.

The result for 2018 is as published earlier this year considred to be somewhere between 15-25 mDKK.

# Rakstrarroknskapur / Income Statement

| DKK 1.000 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning / Premiums written net of reinsurance** | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 218.724 | 208.887 |
| Endurtryggingargjøld / Reinsurance premiums | -22.614 | -42.179 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in premiums provisions | -37.862 | -29.898 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurance premiums provisions | -3.619 | 13.639 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Total premiums written net of reinsurance** | **154.629** | **150.449** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Interest rate income from insurance activity** | **-1.367** | **-1.012** |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning / Compensation expenses net of reinsurance** | | |
| Útgoldnar veitingar / Claims paid | -245.768 | -114.012 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries received | 110.167 | 103.933 |
| Broyting í avsettum endurgjøldum / Change in claims provisions | 136.650 | -349.352 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum endurgjøldum / Change in reinsurance claims provisions | -111.793 | 233.371 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Total compensation expenses net of reinsurance** | **-110.745** | **-126.060** |
| **Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and rebates** | **-2.150** | **-2.150** |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning / Net operating expenses** | | |
| Útveganarkostnaðir / Acquisition costs | -19.907 | -20.328 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administration costs | -16.856 | -15.324 |
| **Útveganar- og fyrisitingarkostnaðir í alt / Total acquisition and administration costs** | **-36.763** | **-35.652** |
| Provisjónir og partar av úrslitinum frá endurtryggjarum / Reinsurance commission and profit particip. recieved | 1.974 | 2.343 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total net operating expenses** | **-34.788** | **-33.309** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical profit/loss** | **5.579** | **-12.082** |
| **Úrslit av íløguvirksemi/ Return on investment assets** | | |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest rate income and dividend etc | 6.804 | 5.313 |
| Virðisjavningar / Market value adjustments | -5.300 | 6.058 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration costs related to investment activity | 271 | -84 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **1.775** | **11.286** |
| **Renta av tryggingartekniskum avsetingum / Interest rate from technical provisions** | **1.367** | **1.012** |
| **Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after technical interest rate income** | **3.142** | **12.298** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **8.720** | **217** |
| **Skattur / Tax** | **-750** | **230** |
| **Úrslit / Net profit** | **7.971** | **447** |

# Fíggjarstøða / Statement of financial position

| DKK 1.000 | 1H 2018 | 31.12.2017 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| **Immateriell ogn / Intangible assets** | **587** | **699** |
| **Materiell ogn / Tangible assets** | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 4.268 | 3.501 |
| Heimbýlisbygningar / Domicile properties | 97.122 | 97.879 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **101.390** | **101.379** |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir / Other financial investments** | | |
| Íløguprógv / Investment funds | 247.978 | 248.981 |
| Lánsbrøv / Bonds | 577.163 | 574.156 |
| Innlán / Deposits | 109.172 | 103.733 |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt / Total other financial investments** | **934.313** | **926.870** |
| **Íløguogn í alt / Total financial investments** | **934.313** | **926.870** |
| **Áogn / Outstanding accounts** | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum / Reinsurers' share of premium provisions | 17.781 | 21.400 |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum endurgjøldum / Reinsurers' share of claims provisions | 95.702 | 207.495 |
| **Endurtryggjaranna partur av tryggingartekniskum avsetingum í alt / Total reinsurers' share of provisions for insurance contracts** | **113.482** | **228.895** |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 19.945 | 12.698 |
| **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **19.945** | **12.698** |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 1.857 | 2.181 |
| Áogn hjá atknýttum virkjum / Receivables from affiliated companies | 89 | 187 |
| Onnur áogn / Other receivables | 2 | 0 |
| **Onnur áogn í alt / Total other receivables** | **1.946** | **2.368** |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **135.376** | **243.961** |
| **Onnur ogn / Other assets** | | |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 612 | 559 |
| **Onnur ogn í alt / Total other assets** | **612** | **559** |
| **Tíðaravmarkingar / Accrued income** | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 1.977 | 2.784 |
| Aðrar tíðaravmarkingar / Other accrued income | 5.489 | 7.112 |
| **Tíðaravmarkingar í alt / Total accrued income** | **7.466** | **9.896** |
| **Ogn í alt / Total Assets** | **1.179.743** | **1.283.365** |

# Fíggjarstøða / Statement of financial position

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2018 | 31.12.2017 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Liabilities** | | |
| | **Eginogn / Equity** | | |
| | Partapeningur / Share capital | 400.000 | 400.000 |
| | Flutt úrslit / Retained earnings | 175.277 | 167.306 |
| | **Eginogn í alt / Total equity** | **575.277** | **567.306** |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar / Technical provisions** | | |
| | Avsett tryggingargjøld / Premium provisions | 116.513 | 78.651 |
| | Avsett endurgjøld / Claims provisions | 459.063 | 595.713 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and discount provisions | 3.514 | 4.328 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt / Total technical provisions** | **579.090** | **678.692** |
| | **Avsettar skyldur / Provisions** | | |
| | Eftirlønir og tílíkar skyldur / Pensions and similar obligations | 3.863 | 3.971 |
| | **Avsetingar í alt / Total provisions** | **3.863** | **3.971** |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to direct insurance | 1.205 | 1.790 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 8.308 | 12.846 |
| | Skuld til atknýtt virkir / Debt to affiliated companies | 879 | 5.382 |
| | Skattur / Tax | 803 | 0 |
| | Onnur skuld / Other | 10.317 | 13.378 |
| | **Skuld í alt / Total debt** | **21.512** | **33.396** |
| | **Skyldur í alt / Total Liabilities** | **1.179.743** | **1.283.365** |
| 1 | Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies | | |

# Eginognsuppgerð / Statement of capital

| DKK 1.000 | Partapeningur / Share capital | Flutt úrslit / Retained earnings | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2017 / Shareholders' equity at January 1, 2017** | **300.000** | **170.462** | **470.462** |
| **Rørslur á eginognini í 2017 / Movements on equity in 2017** | | | |
| Kapitalhækkan / Capital increase | 100.000 | | 100.000 |
| Ársúrslit / Net profit | | -3.155 | -3.155 |
| **Eginogn 31. desember 2017 / Shareholders' equity at December 31, 2017** | **400.000** | **167.306** | **567.306** |
| | | | |
| **Eginogn 1. januar 2018 / Shareholders' equity at January 1, 2018** | **400.000** | **167.306** | **567.306** |
| **Rørslur á eginognini í 2018 / Movements on equity in 2018** | | | |
| Úrslit / Net profit | | 7.971 | 7.971 |
| **Eginogn 30. juni 2018 / Shareholders' equity at June 30, 2018** | **400.000** | **175.277** | **575.277** |

# Notur / Notes

**Nota** **DKK 1.000**

1 **Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies**

## Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr.2).

Hálvársroknskapurin verður vístur í donskum krónum, sum er funktionella gjaldoyra hjá felagnum. Øll onnur gjaldoyru verða mett sum fremmant gjaldoyra.

Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2017, og verður tí víst til hesa.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognsuppgerð og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt sær, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av teimum einstøku tølunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi. Fíggjarlig amboð verða innroknað samsvarandi hesum og verða tikin við í ársfrásøgnina á handilsdegnum.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast álítandi upp.

Fíggjarlig amboð verða innroknað á handilsdegnum, og innrokningin steðgar, tá rætturin at móttaka ella lata pengar frá fíggjarliga amboðnum fer úr gildi ella um fíggjarliga amboðið verður avhendað soleiðis, at váðin og rættindini til vinning í sambandi við ognarrættin í høvuðsheitum eru flutt til annan eigara.

## Generally

The H1 interim report has been rendered in accordance with the regulations stipulated by the Faroese Insurance Act and Decree no. 2 of 30 December 2009 on annual reports for insurance companies and financial holding companies (henceforth Decee no. 2).

The H1 interim report is presented in DKK, which is the functional currency of the Company. All other currencies are cinsidered as foreign currency.

Applied accounting policy is unchanged compared to the annual report 2017.

The H1 Interim Report has not been audited.

### Rounding of figures

The figures in the income statement, the balance and the notes are rounded off. Because the figures are rounded off separately, the rounded figures may add up differently than the underlying figures.

### Inclusion and valuation in the annual report

Assets are included in the balance sheet when it is likely that the Company will derive future financial profit from them and the asset value can be reliably assessed. Financial instruments are included according to this and are included in the annual report on the day of transaction.

Liabilities are included in the balance sheet when it is likely that the Company will lose financial profit and the size of the liability can be reliably assessed.

Financial instruments are recognized at the date of settlement, and the recognition ceases when the right to receive or deliver cash flows from the financial instrument has expired, or if the financial instrument has been transferred, and the Company has essentially transferred all risks and returns associated with the ownership.

Tá ið ognir ella skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða óítøkiligar og ítøkiligar ognir á fyrsta sinni ásettar til útveganarvirði. Eftir hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum lýst fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið til upplýsingar um vinning, tap og váðar, ið koma til okkara kunnleika fram til dagin, tá ársroknskapurin verður lagdur fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru fíggjarstøðudagin.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavning av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broyting í avsetingum og av- og niðurskrivingar – sum er við til at røkka ársins inntøku.

## Konsernviðurskiftir og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslugrundaðum støði.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virði av ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum. Avseting til skaðaendurgjald er tann roknskaparposturin, sum í størstan mun er tengdur at roknskaparligum metingum.

### Dagsvirðið av heimbýlisbygningum

Við máting av dagsvirðinum av bygningum verður eitt avkast-baserað modell nýtt. Dagsvirðið á bygningum er grundað á eina afturdiskontering av framtíðar rakstri við individuelt ásettum avkastkrøvum. Avkastkravið er ásett við støði í staðnum har bygningurin er, møgulig nýtsla og í mun til hvussu bygningurin er viðlíkahildin, hvørjum standi hann er í o.s.fr.

## Útlendskt gjaldoyra

Flytingar í fremmandum gjaldoyra verða við fyrstu innrokning umroknaðar til kursin á flytingardegnum.

Ágóði, skyldur og aðrir gjaldoyraligir postar í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknað uppgerðardagin, verða umroknað við tí endakursi, sum er galdandi uppgerðardagin.

Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Kursjavningar'.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá Tryggingareftirlitinum. Víst verður til brotið "Frágreiðing til lyklatølini" á síðu 13.

Assets and liabilities are initially shown at fair value. However, intangible and tangible assets at initial recognition are measured at cost. Subsequently, assets and liabilities are stated as described below for each entry individually.

Recognition and measurement take into account gains, losses and risks, which occurred prior to the presentation date of the Annual Report and which confirm or disprove conditions, which existed on the balance sheet date.

Income is entered in the profit and loss account as it is gained, this includes market value adjustments. Expenses involved in gaining the income of the year are included in the profit and loss account - including claims, changes in provisions and depreciations and amortisations.

## Group relations and affiliated parties

Trade and services between companies within the group will be handled at market price or at a level meeting expenses.

## Accounting estimates

Determining the carrying value of certain assets and liabilities is associated with an estimate of how future events will affect the value of these assets and liabilities. Mostly determined by accounting estimates are liabilities under Provisions for outstanding claims.

### Fair value of domicile properties

To measure the fair value of properties an asset return model is used. The fair value on properties determined based on the calculated return on operations and the individually determined rate of return. The return rate is fixed on the basis on the location of the individual property, potential use, the state of maintenance, quality etc.

## Foreign Currency Translation

Transactions in foreign currencies are translated at transaction date.

Receivables, payables and other monetary items denominated in foreign currencies are translated at the balance sheet date are translated at the closing price at balance sheet date.

Gains and losses arising between the exchange rate at the settlement date are recognized in the income statement 'Exchange rate adjustments'.

## Key figures

These are rendered in accordance with Decree no 2 of 30 December 2009 on Annual Reports and financial holding companies. Explanation of Key figures is shown on page 13.

# Frágreiðing til lyklatøl / Explanation of Key figures

| Lyklatøl | | | Key ratios | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoendurgjaldsprosent | = | - Bruttoskaðaendurgjøld x 100 / ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) | Claim ratio | = | - Gross insurance claims x 100 / ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Bruttokostnaðarprosent | = | Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt / ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) | Cost ratio | = | Total acquisition and administration costs x 100 / ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Nettoendurtryggingar-prosent | = | Úrslit av endurtrygging x 100 / ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) | Net reinsurance percent | = | Result of reinsurance x 100 / ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Combined ratio | = | - ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingar-kostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 / ( Bruttotryggingar-gjøld - Bonus og avsláttur av tryggingar-gjøldum ) | Combined ratio | = | - ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 / ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Operating ratio | = | - ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingar-kostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 / ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum + Rentu av tryggingarvirksemi ) | Operating ratio | = | - ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 / ( Gross written premiums - Bonus and rebates + Interest rate income from insurance activity ) |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum | = | - Úrslit av endurgjalds-avsetingum fyri egna rokning / Netto skaðatiltak við ársbyrjan | Relative effect on provisions | = | - Result from net claims provisions / Net claims provision at 1 January |
| Eginognsavkast | = | Rakstrarúrslit x 100 / Eginogn (miðal) | Return on equity | = | Result for the year x 100 / Equity (average) |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2018 hjá Betri Trygging P/F.

Hálvársroknskapurin og leiðslufrágreiðingin eru sett upp samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2018, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskapartíðarskeiðið 1. januar – 30. juni 2018.

Tað er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi umrøðu av gongdini í virkseminum hjá Betri Trygging P/F og fíggjarligu støðuni, umframt eina rættvísandi lýsing av teimum týðandi váðunum og óvissu faktorunum, sum felagið kann ávirkast av.

# Statement by the Management

As of today, the Board and Management have reviewed and approved the interim report 1H 2018 for Betri Trygging P/F.

The interim report has been rendered in accordance with the Faroese Insurance Act.

It is our opinion that the financial statement gives a true and fair view of the company's assets, liabilities, and financial position at 30 June 2018 and of the results of the company's operations for the period 1 January – 30 June 2018.

In addition, we also consider the Management's review to give a fair presentation of the development in the company's activities and the company's financial position as a whole, as well as a description of the significant risks and elements of uncertainty that may affect the company.

## Stjórn / Executive Board

**Betri Trygging P/F**
Tórshavn, 30. august 2018

**Ingunn Ósk Eiriksdóttir**
Stjóri / CEO

## Nevnd / Board of Directors

**Lars Bonde**
Nevndarformaður / Chairman

**Teitur Samuelsen**
Næstformaður / Deputy Chairman

Bogi Petursson Nielsen

Gunn Danielsen

Kaj Dam*

Karl Birgir Isaksen

Mimi Steintórsdóttir

Selinda í Heiðinum*

Sonni Lamhauge Petersen*

*Starvsfólkavalt umboð / *Employee Representative

# Partafelagsupplýsingar / Company Information

## Felagið / Company

Betri Trygging P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO 110 Tórshavn
Tel +298 345600
trygging@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 3691 / Company no. 3691
Roknskaparár 16 / Annual Year 16

## Nevnd / Board of Directors

Lars Bonde, nevndarformaður / Chairman
Teitur Samuelsen, næstformaður / Deputy Chairman
Bogi Petursson Nielsen
Gunn Danielsen
Kaj Dam *
Karl Birgir Ziska Isaksen
Mimi Steintórsdóttir
Selinda í Heiðinum *
Sonni Lamhauge Petersen *

* Starvsfólkavalt umboð / *Employee Representative

## Stjórn / Executive Board

Ingunn Ósk Eiriksdóttir, stjóri / CEO

**Betri Trygging P/F**
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
110 Tórshavn

Tel +298 345 600
trygging@betri.fo
www.betri.fo